SJÚKRAHÚS VERKIÐ

## Skurðviðgerð av útstandandi oyrum - Aures alatae

### Fyrireiking:

Skurðviðgerðin fer fram í lokalari doyving (LA) Tí er ikki neyðugt at vera fastandi, um ikki annað er avtalað.
Møtt verður á Barnadeildini, H2 sama morgun kl. 7:30, uttan so annað verður avtalað.

Áðrenn skurðviðgerðina verður nakað av hári rakað rundanum oyruni (uml. 2 cm). EMLA (doyvandi krem) verður koyrt á oyrini.

### Skurðviðgerðin:

Skurðviðgerðin varir 1½-2 tímar, og fer fram á eini stovu á skurðgongini.
Lokal doyving verður sproytað undir húðina rundanum oyrað.
Ein sjúkrarøktarfrøðingur situr hjá tær/barni tínum undir allari skurðviðgerðini.

### Aftaná skurðviðgerðina:

Fyri at styðja aftaná skurðviðgerðina verður umvav lagt á oyruni og rundanum høvdið (sum eitt hárband). Hetta umvav skal sita í 7-10 dagar.
Tú/barn títt verður útskrivað/ur sama seinnapart.
Vanligt er at hava nakað av pínu í oyrunum tá lokaldoyvingin er burtur. Gott er tá at eiga t.d. Panodil heima – Fæst í hondkeypi á apotekinum.

### Ambulant vitjan:

Ein ambulant tíð verður givin at møta á Oyrnadeildini 7-10 dagar seinni, har umvavið og møguliga penturnar verða tiknar. Komandi 2-3 vikurnar skalt tú/barn títt sova við einari nethúgvu, sum fæst frá okkum.

### Áheitan:

Skuldi umvavið loysna í úrtíð, setið tykkum tá í samband við Oyrnadeildina alt fyri eitt á tlf. 304622.
Tað er av stórum týdningi, at umvavið ikki verður vátt, tí má hárvask bíða til hendan er tikin av.
Ikki íðka krevjandi ítrótt í 2-3 vikur aftaná skurðviðgerðina.

### Sjúkramelding:

Vanligt er at verða sjúkrameldað/ur í 10 dagar, men ongin forðing er fyri at fara aftur í skúla ella til arbeiðis, um tú ikki hevur tungt arbeiði, áðrenn hendan tíðin er farin.

Vinarliga

Starvsfólkið á Oyrna-Nasa-Hálsdeildini

Okt. 2025